LANDSKAPPING
**DYSTARSKRÁ 5 / 2023**

# H71

SUNNUDAG/MIKUDAG
**28. JAN. & 1. FEB.**



**MENN: Sunnudagin 28. januar**
## KL.16.00: H71 - Víf
**KVINNUR: Mikudagin 1. februar**
## KL.19.00: H71 - Víf



ODDAGREIN

# EUROPAÆVINTÝRIÐ LOKIÐ Á HESUM SINNI

Kvinnurnar leiktu sum kunnugt áttanda-parts finalu í EHF Europa Cup kappingini hjá kvinnum undanfarna vikuskifti ímóti spanska felagnum CB Atletico Guardes í Pontre Vedra í Spaniu og hóast tær stóðu seg manniliga, so máttu tær lúta í báðum dystum. Fyrra dystin taptu tær 31 - 34 og hin seinra 26 - 28, hóast tær stutt undan leiklok í seinra dystinum vóru á odda við einum máli, 24 - 23. Eitt meistarligt avrik, ið saktans kundi givið okkum sigrar og víðari luttøku, vóru vit eitt sindur hepnari og neyvari avgerandi løtur, serliga við leiklok í seinra dystinum. Europaævintýrið er lokið á hesum sinni og eins og í fjør, so stendur ein eftir við eini ernari kenslu í barmi, at okkara ungu kvinnur, ið fyri bert fáum árum síðani vunnu sær luttøku í fremstu føroysku deildini, enn einaferð hava gjørt so ógvusliga um seg í EHF europeisku cup kappingini. Skal endurtaka, at ein má ivist í um nakað føroyskt lið nakran tíð kemur at gera teimum hetta eftir, neyvan.

Tá europeiska luttøkan soleiðis er lokin fyri í ár, er hóskiligt at faldarin vendir kikaran ímóti heimligu kappingini, har

bæði fremstu lið okkara í kvinum og monnum nú taka uppaftur leikin bæði í steypa- og landskappingini.
Í landskappingini liggja menninir á einum triðjaplássi í hølunum á báðum liðunum úr norðstreymoy, KÍF og VÍF. Tó so, tætt er í ovara parti av kappingini, so nógv skal ikki ganga galið, so fella vit nøkur pláss á stigatalvuni. Sum kunnugt er landskappingin í ár háttað so, at bert aftasta liðið í grundspælinum fellur út. Øll hini seks liðini vinna sær luttøku víðari í kappingini. Tvey tey fremstu liðini spæla seg beint í semifinaluna, ímeðan nr. 3 ímóti nr 6. og nr. 4 ímóti nr. 5, skulu leika eina fjóringsfinalu um at koma í semifinaluna ímóti ávikavíst nr. 1 og nr. 2. Hóast vit ikki hava stinnasta liðið í ár, so eru vit tó longu nú ræ ttuliga vísir í ikki at gerast aftast í grundspælinum hjá monnum. Manningin er ung og nýggj og teir, ið skuldu bera liðinum í ár, hava í stóran mun verið darvaðir av skaðum.
Hóast hetta hava vit staðið okkum væl og kunnu vit fáa allan verandi hóp tøkan til avgerandi dystirnar, so skuldi ikki verið ómøguligt at vunnið seg fram til heiðursmerki í ár, bæði í lands- og steypakappingini hjá monnum.
Kvinnur okkara hava higartil í ár verið at kalla einaráðandi í bæði lands- og steypakappingini. Í landskappingini eru tær einsamallar á odda og hava bert mist eitt stig alt kappingarárið. Í steypakappingini eru tær komnar víðari til semifinaluna uttan at missa eitt einasta stig í bólkaspælinum. Meg listi at sæð tað lið í føroysku kvinnukappingini í ár, ið skalar kvinnur okkara, soleiðis sum tær eru mannaðar og leika í løtuni. Ein kann tó ongantíð varða seg fyri skaðum og slíkum óhappum, sum skjótt kunnu taka sjálvt stekasta lið av fótum. Eitt er tó vist og tað er, at neyvan hevur verið sterkari lið í føroyskum kvinnuhondbólti enn verandi kvinnulið okkara.




WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
Ford
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
effo
78
BANKNORDIK
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



# MARGRÉT BECH

**Ein serlig eldsál, sum vit ikki kunnu vera fyriuttan**

Sigur tú H71, so mást tú eisini siga Margrét ... men hvør er hon? Flestu H71'arar hava sæð Margrét til dystir, har H71 spælir, men vita vit hvør hon er?

H71 faldarin hevur hitt Margrét til eitt prát um at vera virkin stuðul í H71. Sum tað fyrsta, spurdu vit Margret, hvar hennara áhugi fyri H71 stavar frá.

- Áhugin hjá mær fyri H71 stavar, sum hjá so mongum øðrum frá, at børnini byrjaðu at spæla hondbólt, sigur Marg-



rét. - Hjá mær byrjaði tað við, at yngri sonurin, sum 12 ára gamal, byrjaði at spæla hondbólt í Hoyvík.
Margrét heldur fram at greiða frá, at orsøkin til, at áhugin er so stórur fyri H71 er nokk tann, at tá teir sum smádreingir spældu dystir bæði á bygd og heima í Hoyvík, vóru tey altíð væl mannað, t.v.s. foreldur og onnur systkin vóru rundan um liðið. Onkuntíð gjørdu tey mat og hugnaðu annars um liðið. Alt hetta gjørdi at dreingirnir trivust so sera væl.

## Gevandi at vera virkin í H71

Eitt er tað, at felagið og leikarar fáa ágóðan av at hava virkin foreldur og stuðlar, men fær man sum virkin stuðul nakað burturúr? Hetta spurdu vit Margrét um:

- Einfalda svarið er ja, sigur hon, og heldur fram. - Eg havi eitt nú fingið eitt heilt serligt forhold til teir dreingirnar, sum vóru í tí árganginum. Eg fylgi við teimum á síðulinjuni og tá eg so hitti foreldur frá tí tíðini, kemur prátið oftani inn á ta tíðina, teir vóru smáir og hvussu góð tann tíðin var.

## Áhugin vaksin gjøgnum árini

Og áhugin fyri hondbólti og H71 er ikki minkaður gjøgnum árini, men er heldur vaksin, greiðir Margrét frá.

- Gjøgnum árini eri eg blivin alsamt ivrigari í hondbólti enn eg var fyrr. Eg gleði meg til hvønn einasta dyst, eg fari til og oftani møti eg til dystin langt áðrenn dysturin skal byrja. Tað kann ljóða løgið, men viðhvørt eri eg so ivrig, at eg gerist ein partur av dystinum og rætti armin út í tóman heim fyri at lofta bóltinum sum er í spæli.

## Kvinnuliðið hjartabarnið

Nú Margrét hevur verið virkin í H71 í góð 16 ár og hevur upplivað mangt og hvat í hondbóltsverðini, er tað serstakliga kvinnuliðið hjá H71, sum hevur hugtikið hana. Margrét greiðir frá, at tá H71 kvinnur í 2017 byrjaðu at spæla í bestu deildini í hondbólti var nakað heilt serstakt.

- Eg byrjaði heilt av tilvild at fylgja teimum nøkur ár frammanundan. Ikki tí, eg hevði so stóran áhuga fyri kvinnuhondbólti. Tað byrjaði við, at sonurin hevði spælt ein dyst og eg bleiv onkursvegna sitandi eftir í høllini. So byrjaðu kvinnurnar, sum tá spældu í 1. deild, at spæla. Eg legði til merkis, at tað vóru sera fáir áskoðarar, og í mestan mun vóru tað foreldur, sum vóru til dystin og tað helt eg vera synd. Nógvar av teimum vóru blaðungar og royndu seg fyrstu ferð í vaksnamanna deildini. Eg helt, at tað var so stuttligt at síggja, hvussu tær stríddust og mentust fyri hvønn tann einasta dyst. Tá setti eg mær sum mál, at eg skuldi fylgja teimum til tær vóru fluttu upp í bestu deildina at spæla. Tað skal so sigast, at tað bar ikki til at sleppa teimum aftur og hinvegin blivu tær mítt hjartabarn.

## H71 mennist í luttøku bæði uttanlands og heima

Margrét heldur, at tað at nú bæði kvinnur og menn hjá H71 eru farin út í Evropa at spæla er einastandandi gott fyri hondbóltin - ikki bara fyri okkum í Hoyvík, men fyri allar Føroyar. Hon heldur, at spælararnir mennast fyri hvønn einasta dyst og so er tað sera stuttligt hjá okkum øðrum at fylgja við og vera eina partur av teimum.


TRYGD

## Hendingaríkt H71 ár

Spurd um onkra serliga hending, sum hevur fest seg í minnið, sigur Margrét:
- Ein hending, sum hevur fest seg í minnið hjá mær og sum eg gleðist yvir er, at H71 bleiv føroyameistarar hjá bæði kvinnum og monnum í 2022, men serstakliga at kvinnurnar vunnu sítt fyrsta meistaraheitið.
Margrét greiðir frá, at tá kappingarárið er liðugt ganga leikarar hús úr húsi og steðga á eina løtu áðrenn tey fara víðari.
- Tað er nakað ein altíð sær fram til. Tá kappingarárið 2022 var liðugt komu tey framvið hjá okkum og fleiri endaðu í hitapottinum, greiðir Margrét flennandi frá. - Eina løtu vóru tey ikki færri enn 15 í pottinum, so tit kunnu ætla, hvussu lítið vatn var eftir í pottinum, tá tey einaferð komu uppúr aftur. Tað, sum var heilt serligt hesaferð var, at kvinnurnar vóru eisini væl umboðaðar.

## Áhugin fyri H71 kann vera so nógv

Í viðtalu við ein trúgvan og drúgvan stuðul og viðhaldsfólk hjá H71, eru vit forvitin at frætta, hvussu man kann vísa áhuga og vera virkin í H71. Tí spyrja vit Margrét um hugskot til, hvussu man kann vera virkin í felagnum. Margrét greiðir frá, at hon hevur verið partur av H71 síðani 2006, tað vil siga í góð 16 ár.
-Tá dreingirnir vóru smáir, skipaði H71 fleiri ferðir fyri hondbóltsskúla og tað skulu nógvar hendur til fyri at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind. Vit vóru fleiri foreldur, sum hjálptu til og lønin afturfyri var glaðu børnini, sum høvdu hugnað sær við spæli, undirvísing og góðum vinalag. Tað var ein sera góð og gevandi tíð.
- Eg eri til flest allar dystir hjá kvinnum og monnum hjá H71, í hvørtfall til teir, sum verða spældir í meginøkinum.
- Eg baki til flestu heimadystirnar hjá H71. Eri eg burturstødd, traðkar onkur annar til. Eg baki eisini av og á, tá H71 skipar fyri onkrum tiltaki.
Eg havi skipað fyri hugnakvøldi heima hjá mær fyri bæði kvinnum og monnum, við mati, hugna og ikki at gloyma famøsa hitapottinum. Tað er serstakliga hugnaligt og eri eg mitt í rokanum - og eg elski tað!
Spurd um tað ikki er møtimikið, at vera so virkin í felagnum, og um hon ikki onkuntíð er móð av H71, sigur Margrét:
- Móð av hvørjum? Trívist man í einum felagsskapi sum H71 er, ella følir seg væl, so troyttast man ikki, tað geri eg í hvørfall ikki. Tað fer einki av mær, um eg brúki eitt sindur av orku og tíð uppá H71.

## Týdningur fyri felagið at hava íðin viðhaldsfólk og stuðlar

Margrét sigur, at H71 er eitt væl rikið felag við góðari leiðslu og nógvum góðum fólki rundanum, sum ikki eru bangin fyri at taka hond í, tá á stendur.
- At stjórna einum so stórum felag krev-



ur sítt. Alt skal ganga upp í eina hægri eind, alt frá dystum, hallartímum og ikki minst tann fíggjarligi parturin, sum skal til fyri at reka eitt so stórt felag sum H71 er. Tí er tað alneyðugt, at vit øll, sum eru góð við H71 geva eitt sindur av okkum sjálvum og stuðla leiðslu og leikarum so felagið heldur fram at blóma, sigur Margrét.

- Eg haldi, at tað er sera umráðandi fyri felagið at hava íðin viðhaldsfólk, sum stuðla spælarunum, eru jalig og koyra á, tá á stendur. Tað kann vera eitt sindur einsligt og tungt til onkrar av dystunum, tá tøgnin valdar og tað er heilt týðiligt, at spælararnir spenna seg meira út, tá rópt verður.

- Eg eri framhaldandi ein partur av H71 familjuni, hóast eg ikki havi nakran, sum spælir hondbólt longur. Tað er jú ikki ein treyt, at tú skal hava nakran, sum spælir hondbólt fyri at vera partur av H71.

- Øll eru vælkomin í H71 óansæð hvør man er. Tú verður væl móttikin. Gevur tú nakað til felagið kann eg lova tær, at tú fært góðan felagsskap og ikki minst eina familju í Hoyvík, sigur Magrét at enda í viðtalu við H71 faldarin.

H71 takkar Margrét so miriliga fyri dyggan og trúgvan stuðul øll hesi árini og vónar at kunna liva upp til álitið og ágrýtnið, sum verður víst felagnum. Eitt er so í øllum førum vist: Uttan eldhugaðar H71-stuðlar onki H71-felag!


FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI
AnniJanni
















DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO


Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj
vøra!




Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



1 Rúna Jógvansdóttir Larsen
2 Elsa Egholm
4 Brynhild Pálsdóttir
5 Vár Bentsdóttir Zachariasen
6 Bjørk Brimnes
7 Maria Halsdóttir Weyhe
8 Karin Egholm
9 Marita Mortensen
11 Lukka Arge
12 Alda av Skarði
13 Inga Maria Joensen
14 Sunniva Bogadóttir
15 Christina Turiðardóttir Arge
17 Lív Bentsdóttir Zachariasen
25 Sára Jacobsen
27 Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe
29 Poula Fríðheim Petersen
77 Jana Mittún
99 Guðrið Bogadóttir á Borg

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjálparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Alexander Lein Martinsen
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen / Ingilín Holm

sms

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.** | **H71** | **14** | **507** | **344** | **163** | **27** |
| 2. | Kyndil | 14 | 454 | 329 | 125 | 21 |
| 3. | Neistin | 14 | 404 | 325 | 79 | 21 |
| 4. | Stjørnan | 14 | 418 | 385 | 33 | 16 |
| 5. | Víf | 14 | 384 | 387 | -3 | 14 |
| 6. | Stíf | 14 | 311 | 448 | -137 | 5 |
| 7. | VB | 14 | 279 | 409 | -130 | 4 |
| 8. | EB | 14 | 320 | 450 | -130 | 4 |



1 Torstein Sivertsen
2 Sveinur Olafsson
5 Rói Seyer Hjaltason
7 Baldur Gillason
8 Tórmóður Petursson Djurhuus
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
10 John Skaalum Vilhelm
15 Ragnar Karlsson
18 Sakir Tróndarson Frýdal
21 Høgni Højsted
23 Ári Rúnason
28 Rói Ellefsen á Skipagøtu
31 Rói Heinason Thomsen
39 Rókur Ziskason
45 Peter Krogh
50 Alexander Lein Martinsen
71 Bogi Hansen

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen / Hanus Mortensen

BURN FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Víf | 11 | 327 | 295 | 32 | 19 |
| 2. | Kíf | 12 | 350 | 329 | 21 | 16 |
| **3.** | **H71** | **12** | **335** | **321** | **14** | **15** |
| 4. | Neistin | 12 | 325 | 346 | -21 | 11 |
| 5. | Team K. | 11 | 291 | 299 | -8 | 10 |
| 6. | Stíf | 12 | 360 | 355 | 5 | 9 |
| 7. | Kyndil | 12 | 298 | 341 | -43 | 2 |

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



JÁKUP SÍMUN SIMONSEN

# PARTILLE-CUP LUTTØKA STYRKIR FELAGSSKAPIN

*Okkara D11 lið vann Partille Cup 2022*

H71 hevur luttikið í Partille cup í Gøteborg í Svøríki annaðhvørt ár síðani 2011. Tó var ongin kapping í Coronatíðini, men í 2022 var aftur kapping hildin. Sostat hevur H71 luttikið 6 ferðir. Umleið 150-200 leikarar úr felagnum luttaka, og talið av foreldrum og familjulimum man vera nakað tað sama.

Stórt fyrireikingararbeiði er undan kappingini, har foreldur og luttakandi børn taka lut í ymsum tiltøkum fyri at savna pening inn til ferða- og luttøkuútreiðslur. Harumframt er miðvís venjing á skrá út á summarið fyri at fyrireikingarnar eru so góðar sum gjørligt. Roynt verður eisini at liðini ferðast saman úr Føroyum og koyra saman við bussi til Gøtuborgar, har búð verður á skúla.

Sjálvur luttók eg í 2022 sum hjálparvenjari hjá dreingjum 13 ár saman við Alfredi Jacobsen. Simon Olsen var høvuðsvenjari.

Vit búðu nakað uttanfyri miðbýin á Guldhedsskolan. Sporvagnasambandið er gott í býnum, so skjótt er at koma frá staði til stað. Fitt og blíð fyristøðufólk á skúlanum og góður matur í matstovuni á skúlanum.

Hetta vóru minniligir og góðir dagar í størstu ungdómskapping í hondbólti

í heiminum. Tað, at búgva saman við dreingjunum og øðrum liðleiðarum, leggja tilrættis dagsskrá og leikætlan – var ein stuttleiki og hugni. Tó at flestu leikirnir eru í miðbýnum á Heden, so eru dystir eisini nakað uttanfyri miðbýin. Vit leiktu eisini á Valhalla og úti í Kviberg.
Ein av døgunum er kappingin soleiðis løgd tilrættis, at møguleiki er at vitja í stuttleikalundini Liseberg, har høvið varð at royna ymiskt til stuttleika.
Eitt, sum ein legði til merkis var, at sviar, sum fylgdu við hondbólti, kendu allir til H71 úr Føroyum. Hetta kemur sjálvsagt av at okkara stóra stjørna úr H71, Elias Ellefesen á Skipagøtu, leikar við Savehof úr Gøteborg.
Tó at felgsskapurin og luttøka er tað týdningarmesta, so var sjálvsagt eisini farið eftir úrslitum á leikvallum. Tað er jú eisini tí, at kappingar verða fyriskipaðar.
Og væl hildnaðist. Bæði dreingir 11 og dreingir 13 hjá H71 vunnu gull í A-finalunum. Gentur 11 vunnu B-finaluna.
Eftir strævnar og minniligar dagar, so nýttu fleiri møguleikan at fara víðari í feriu, meðan onnur fylgdust heimaftur á klettarnar.
H71 fer aftur at luttaka í Partille cup í 2023, og vit eru fleiri sum fara við :)









VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til *HITA*
*SANITET &*
*VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

FAROE SHIP


Mynd: Gudmund Helmsdal
LAIDERZ
Fokus på sportsfaciliteter
HOYVIKSVØLLURIN
Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.
JUTA MASTER 40/200 á EL25


www.laiderz.dk

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

Et her, tak við ella bílegg

# mál

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




*10 Miðal salatir*

**350,-**

Spar 50 kr

Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi   Hoyvíksvegur 67   FO-100 Tórshavn   Tel. 475000   ns@ns.fo   ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SISU
SKORA
VIÐ
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip